**Kári á Rógvi, ritstjóri**

# Nú er næst at hesir lutir eru landinum hentastir

Við áleið hesum orðalagi byrjaði lógteksturin í seyðabævinum frá árinum 1298. Seyðabrævið tykist vera ein rættarbót frá norska kongsyninum, Hákuni hertuga. Men helst býr ein annar veruleiki undir. Norrønu londini vesturi í havi høvdu leingi verið fyri ágangi frá størru grannunum. Longu í 1035 vita vit, at norskur kongur fyrstu ferð lætst at ráða í Føroyum og at meta Føroyar sum len. Men ikki fyrr enn í seinnu helvt av trettandu øld tykjast vestaru londini sjálvi at hava viðurkent fremmant ræði. Hebridurnar og Man viðurkenna yvirvaldið hjá skotskum harrum, meðan hini norðaru so við og við ganga undir norskar kongar.

Føroyar gjørdu helst sum síðsta landið eina realpolitiska semju í árinum 1271. Vit viðurkendu kongsins ræði, men treytaðu okkum eins og íslendingar í teirra 'gamla sáttmála' innlendis sjálvræði.

Til tess at gleða kong var hansara landslóg sett í gildi fyri gomlu lógarverkini, ið vit høvdu tikið úr Norra. Men seyðabrævið verður longu fráboðað í 1271 sum tær lógbøtur, 'sum lógbók teirra sjálvs váttar áður.'

Henda støða heldur fram til í dag. Fyrst norskir, so danskir kongar halda uppá persónligt fullveldi í oyggjunum. Nú hevur danska ríkið, skipað við fólkaræði og stjórnarrætti, tikið við kravinum at eiga fullveldi í Føroyum.

Við heimastýrislógini fingu vit eina støðu merkiliga líkari teirri frá 1298. At síggja til er talan um, at ríkið letur landinum vald. Men politisku samráðingarnar eins og viðtøkan, fyrst á tingi í Føroyum, so í Danmark, vitna um eina sáttmálastøðu.

Fyri føroyingar er spurningurin enn, hvat realpolitiskt er skilabesta loysnin. Skulu vit halda fast um skipanir, har vit yppa øksl at útlendingum, ið fyri yvirræði á pappírinum vilja lata okkum góðs og fæ, meðan vit, sum onki var hent, ráða okkum sjálvum? Ella skulu vit kasta av okkum tað vald, ið spillir land og lyndi okkara?

Tað er fyri ein og hvønn sjálvan at avgera, hvørja støðu at taka.

Fyri tann lógkøna stendur eftir, at hesir lutir eru landinum hentastir, at Føroyar fáa egið lógarrit at lýsa og viðgera ta lóg, ið her er galdandi.

Tørvurin á einum lógarriti kann neyvan undirmetast. Føroyar hava altíð verið egið løgdømi við egnum lógum og dómum. Talið av lógum, dómum og avgerðum, ið bert hava gildi í Føroyum er stórt. Við nýggju stýrisskipanarlógini eru nú lógir, ið bert eru skrivaðar á føroyskum.

FLR fer at hava fleiri sløg av tilfari. Teoretiskar viðgerðir, lýsingar av praksis hjá fyrisitingini og kærunevndum, umframt fastar tættir av ymsum slagi. Lógarritið kemur væntandi út á vetri, vári og heysti.

Fyrsta ritið er tó eitt evnisrit um fólk og fullveldi. Nógvir óloystir spurningar eru viðvíkjandi støðu Føroya. Gjørdust vit nakrantíð partur av Norra, ella Danmark? Eru Føroyar eitt land, føroyingar eitt fólk ella tjóð? Hava vit ræði á egnum landi, ella eiga vit rættin at fáa tað, ella er rætturin farin fyri bakka? Ber tað til at vera land og fólk og framvegis vera innanfyri ein størri valdskarm?

Vit byrja orðaskiftið við hesum trimum greinunum. Landsmaður okkara, Halgir Winther Poulsen, spyr, um føroyingar eru tjóð. Høvundurin lýsir, hvørji fyrilit í altjóða lóg gera av, hvør fólkabólkur kann metast vera tjóð. Mett eftir hesum fyrilitum eru føroyingar tjóð, og bert føroyingar sjálvir kunnu sløkkja støðu og rætt okkara sum tjóð. Íslendingurin, Guðmundur Alfreðsson, nemur við, hvat tað merkir í altjóða lóg at vera tjóð. Han vísur á, hvussu stóran týdning tað hevur, at vit kenna støðu okkara í samráðingum um at nýta sjálvræðisrættindi. Skotarnir, Alasdair Geater og Scott Crosby, viðgera sjálvsavgerðarrættin bæði í nútíðar og søguligum høpi. Serliga áhugavert er, tá tjóðir og lond í dag leita saman í felagskapir sum ES, hvønn týdning slíkir felagskapir hava fyri rættin og møguleikan hjá smálondum og smátjóðum at nýta rættin sjálvi at gera av støðu sína.